# Henrik er meistari

**Venjarin hjá føroyska landsliðnum var á liðnum hjá Lyngby, sum leygardagin vann DM í old boys. Stóri spælarin var Michael Laudrup**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jóannes Hansen*

Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, gjørdist leygardagin danskur meistari. Nú er langt síðani, at toppskjúttin á EM liðnum í 1992 var upp á sítt besta sum spælari, men leygardagin var hann á liðnum í barndómsfelagnum, Lyngby, sum vann DM finaluna fyri old boys.

Finalan var ímóti AGF, sum millum spælararnar hevði eitt nú Flemming Povlsen. Lyngby vann 4–1. Michael Laudrup, sum verður mettur at vera besti danski spælarin nakrantíð, skoraði øll fýra málini. Spælið hjá honum vísti, at hann framvegis er sera væl fyri, og venjingarstøðan er góð, tí hann venur ofta við superligu liðnum hjá Brøndby.

Henrik Larsen er ikki í heilt so góðari venjing. Michael Laudrup spældi hann eina ferð fullkomuliga blankan. Tá ið Henrik ætlaði at sneiða framvið málverjanum, var hann so óheppin at fáa bóltin í skinnabeinið, hann datt, og bólturin sprakk inn til málverjan.

– Tað var ein óslætti á vøllinum, var viðmerkingin hjá føroyska landsliðsvenjaranum!

Í hesi vikuni skulu Lyngby og AGF spæla steypafinalu fyri old boys. Tá ætla teir í AGF at vera betri mannaðir. Um teir fara at megna at syfta Michael Laudrup er ein heilt onnur søga.



*Toppskjúttin frá EM í '92 gjørdist danskur meistari um vikuskiftið, men tað eydnaðist honum ikki at koma á máltalvuna*

# Esbjerg er nú ovast

**Men tað verður ikki roknað við, at vesturjydarnir fara at verða førir fyri at halda stóru feløgini í Keypmannahavn aftanfyri seg**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað kemur ikki so ofta fyri, men nú er tað – fyribils í hvussu so er – ein veruleiki. Tað eru hvørki FCK ella Brøndby, sum eru fremst í superliguni. Í staðin er tað Esbjerg, sum er nýtt oddalið. Sunnudagin vunnu teir á heimavølli 2–0 ímóti Herfølge. Júst Herfølge er seinasta felagið, sum frammanundan Esbjerg megnaði at halda stóru feløgunum í Keypmannahavn aftanfyri seg. Allir fótbóltshugaðir føroyingar minnast, at Herfølge við Jákupi Mikkelsen í málinum vann DM í 2000. Ta ferðina varð aftur og aftur sagt, at Herfølge hevði bara oddasessin til láns, og at FCK og Brøndby fóru at taka seg framum bygdarfelagið, áðrenn kappingin var liðug. Men soleiðis gekk tað ikki.

Nú verður sama søgan endurtikin. Tað fer ikki at eydnast hjá Esbjerg – talan er um væl størri felag enn Herfølge – at varðveita oddasessin. Víst verður á, at breiddin hjá Esbjerg er ikki tann sama, sum hon er hjá stóru feløgunum í høvuðsstaðnum. Í Esbjerg eru sera týdningarmiklir lyklaspælarar. Ein av teimum er Tommy Bechmann. Hann skoraði sunnudagin bæði málini, tá ið Esbjerg vann 2–0 ímóti Herfølge. Donsku miðlarnir tosa um, at álopsspælarin fer at verða seldur uttanlands, men sjálvur sigur hann, at tað verður í hvussu so er ikki hesumegin summarsteðgin.

Ein annar lyklaspælari í Esbjerg er Jan Kristiansen. Donsku miðlarnir vita at siga, at hann er á listanum hjá eingilska West Bromwich Albion, og at eingilska felagið er áhugað í at keypa vongspælaran longu í januar. Tað verður mett at fara at verða so mikið dyggur smeitur fyri Esbjerg, at teir skjótt kunnu gerast ov stuttir í kappingini við Brøndby og FCK.

### Framúr undirhald

Seint seinnapartin sunnudagin dystaðust Brøndby og FCK frammanfyri knappliga tredivu túsund áskoðarum á Brøndby stadion. Úrsltið var 2–2, og báðir venjararnir, spælararnir, pressan og áskoðararnir søgdu seg at vera nøgt við tað, sum tey høvdu verið vitni til.

Fyri spenningin og intensitetin varð tað mett at hava stóran týdning, at FCK var frammanfyri bæði 1–0 og 2–1. Tvífaldur málskjútti hjá FCK var Sibusiso Zuma. Hann var sera væl upplagdur, og fyrra málið, tá ið hann lyfti bóltin upp, áðrenn hann heilfluktaði, varð sagt at hava verið í heimsflokki. Spælararnir hildu seg at hava verið partur av avriki, sum toldi sammeting við tað besta í Europa.

Zuma var ikki so blíður, hóast hann varð kosin sum besti maður á vølli. Hann var ikki fegin um tað, sum BT leygardagin hevði fingið buturúr samrøðu við hann. Sambært samrøðuni skuldi Zuma hava sagt, at hann iðrar seg um, at hann síðsta ár skrivaði undir sáttmála, sum bindur hann til FCK fram til á sumri 2006. Sambært samrøðuni skal Zuma hava sagt, at hann nú heldur hevði havt viljað, at hann var sáttmálaleysur síðsta summar. Ivaleyst man Zuma hava sagt okkurt, sum luktar av hesum, og ivaleyst man blaðmaðurin hava spent bogan ríkiliga nógv. Avleiðingin er í fyrsta umfari, at Zuma sunnudagin boðaði frá, at hann ikki vil tosa við skrivaðu pressuna. Men tað man bara vera fyribils. Hvørki FCK ella Zuma kunnu liva við, at álopsstjørnum gongur við heftiplástri fyri munnin.

### Tungt í botninum

Fyri triðju ferð hevði nýggi svenski venjarin ábyrgdina av AGF, og fyri triðju ferð fingu teir øll stigini. Hesa ferð var tað ímóti FCM, sum hevur mist nógv og ikki longur er partur av toppinum. AGF er farið úr botninum og er nú í miðjuni.

Í botninum stendur illa til hjá AB. Sunnudagin taptu teir fyri 11. ferð á rað. Hesa ferð var tapið rættuliga tepurt. OB, sum styrkti um sína støðu á fjórða plássinum, vann 1–0 á heimavølli. AB venjarin heldur, at hansara spælarar hava einki sjálvsálit, og hann hyggur ivaleyst meiri enn nakar annar fram til annað vikuskiftið í desember, tá ið superligan fer í vetrarfrí.

FC Nordsjælland hevur oppað seg síðstu vikurnar. Hesa ferð vóru teir í Aalborg, har tað var um reppið, at teir fingu øll stigini. Eitt korter undan leikloki vóru teir frammanfyri 3–1, men heimaliðið megnaði at javna til 3–3.

Eftir stórsigur ímóti FCN í fyrsta dystinum við nýggjum venjara hevði Frem tapt fýra ferðir á rað. Hesa ferð vóru teir í Viborg, har tað eydnaðist gestunum at varðveita málleysa javnleikin.

# Dánial aftur í NSÍ

**Higartil hevur NSÍ gjørt avtalu við tveir spælarar, meðan tað er greitt, at ein av teimum, sum vóru við í ár, ikki verður við aftur næsta ár**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

Dánial Hansen fer næsta ár at spæla við NSÍ. Tað veit heimasíðan hjá felagnum at siga. Dánial Hansen spældi í ár við B68. Í fjør var hann á Skála, men annars hevur hann bara spælt við NSÍ, har hann fótbóltsliga er uppvaksin.

Dánial er fjøltáttaður spælari, sum kann brúkast so at siga alla staðni á vøllinum. Í B68 var hann miðverji og vongverji, hann var á miðvøllinum, og hann var eisini í álopinum.

Tað hevur ljóðað, at tað í NSÍ varð arbeitt við at fáa fleiri spælarar til felagið. Eftir kappingarenda segði venjarin, Jógvan Martin Olsen, at tað ikki kundi roknast við, at NSÍ skuldi røkka meiri enn fjórða plássinum við tí manningini, sum teir høvdu. Felagið hevur ikki dult, at teir fegnir vilja vinna FM, sum teir higartil ongantíð hava vunnið. Tí er ikki undarligt, at tað verður arbeitt við at styrkja um liðið.

Umframt Dánial Hansen hevur NSÍ styrkt seg við miðvallaranum Aleksandar Jovevic, sum í ár var hollur stuðul á miðvøllinum hjá Skála. Jugoslaviski spælarin skal á liðið í staðin fyri Ian Højgaard, sum er fluttur til Danmarkar og tískil ikki verður við NSÍ næsta ár.



# Lítið veiggj í føroysku feløgunum

**Vejle, sum nú fer at skifta venjara, tapti á heimavølli, og Fremad Amager misnýtti brotsspark og fekk bara javnleik á heimavølli ímóti einum øðrum botnliði**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur ikki væl hjá feløgunum í næstbestu deildini, har føroyingar eru partur av manningini. Í Vejle gongur tað av skriðuni, og síðsta vikan hevur avgjørt ikki boðað frá bjartari framtíð. Mitt í vikuni gjørdi býráðið í Vejle av, at kommunan skal ikki vera partur av ætlanini um stórstadion saman við fleiri øðrum. Tveir dagar seinni gjørdi felagið av, at teir skulu ikki leggja saman við øðrum feløgum, og sunnudagin tapti Vejle enn eina ferð.

Hesa ferð vóru Christian Høgni Jacobsen, sum var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og liðfelagarnir á heimavølli ímóti HFK Sønderjylland. Gestirnir skoraðu í 8. og í 12. minutti, og so komu ikki fleiri mál. At tað er lítið hugaligt í Vejle sást kring vøllin. Bara 518 áskoðarar vóru eygnavitni, tá ið Christian Høgni Jacobsen fekk blómutyssi, tí hann nú hevur spælt hálvt hundrað dystir fyri Vejle.

Fyrrverandi landsliðsspælarin Steen Thychosen hevur verið venjari hjá Vejle seinastu mánaðirnar. Nú næstbesta deildin í Danmark fer í vetrarfrí, skal Vejle skifta venjara. Steen Thychosen, sum hevur víst Christian Høgna stórt álit, verður aftur ítróttarstjóri. Christian Høgni Jacobsen hevur í heyst skorað sjey mál í landskappingini. Hóast tað hevur gingið illa hjá Vejle, sum bara er tvey pláss omanfyri niðurflytingarstrikuna, so hevur tað gingið betri hjá føroyska spælaranum, enn tað nakrantíð áður hevur gjørt í Danmark.

Fremad Amager hevði heimavøll ímóti B93, sum eisini er millum feløgini, ið ikki eru serliga væl fyri. Úrslitið var málleysur javnleikur. Tá ið seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt misnýtti Fremad Amager brotsspark. Jann Ingi Petersen var á vøllinum fyrstu 79 minuttirnar. Nú fer hann til Føroya í vetrarfrí. Higartil hevur tað ikki eydnast Fremad Amager at vinna, meðan føroyski miðvallarin hevur verið í felagnum.

Næsta royndin verður 21. mars. Tá skal Fremad Amager spæla á heimavølli ímóti Brønshøj, sum er undir strikuni. Sambært venjaranum hjá Fremad Amager er málið hjá teimum nú at varðveita plássið í deildini í hesum kappingarárinum. Møguleikin fyri hesum verður ikki minst treytaður av, hvussu tað fer at hilnast 21. mars.

Vejle skal í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin spæla á útivølli ímóti Horsens, sum er topplið. Tað verður sera torfør uppgáva hjá Chstian Høgna og teimum.

Hesa ferð spældi Horsens á útivølli á Falster. Johan Byrial Hansen og liðfelagarnir vunnu 3–1. Teir hava 40 stig, og várið fer nevyan at vera gamalt, áðrenn teir fara at hava tryggjað sær annað uppflytingarplássið.

Randers FC; sum er nummar tvey við 32 stigum, vann á heimavølli 3–1 ímóti Ølstykke, og Silkeborg, sum er nummar trý, vann á Eysturbrúgv í Keypmannahavn 3–1 ímóti Skjold.

Í botndystinum vann FC Århus 2–1 í Brønshøj, og eitt annað botnlið, B1913, tapti 1–0 á heimavølli ímóti Fredericia. FC Nordjylland og Køge spældu málleysan javnleik.

# Tað stendur illa til

**Partick Thistle hevur í tólv dystum bara fingið tvey stig, men higartil hevur venjarin ikki mist arbeiðið**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Tað gongur illa hjá Partick Thistle. Leygardagin vóru teir á útivølli ímóti Livingston, og teir fingu einki burturúr. Heimaliðið skoraði tvey mál í 1. hálvleiki. Partick Thistle fekk einki mál, og harvið fóru teir ongul í reyv aftur til Glasgow. Hetta er leiklutur, sum teir í Thistle kenna væl til. Higartil eru tólv umfør spæld í skotsku kappingini, og Partick Thistel hevur bara megnað tveir javnleikir. Enn er einki hoyrt um, at teir skulu skifta venjara.

Jákup Mikkelsen hevur framvegis ikki fingið møguleikan aftur, síðani hann í september varð settur uttanfyri orsaka av sjúku. Aftur leygardagin var Jákup á beinkinum. Tað er lítið hugaligt. Ikki minst tá havt verður í huga, at Jákup er einsamallur í Skotlandi, har hann er sáttmálabundin inntil næsta summar.




*Jákup Mikkelsen*

**Danska superligan**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 17 | 12 - 3 - 2 | 32 | 14 | 18 | 39 |
| 2 | Brøndby (S) | 17 | 12 - 3 - 2 | 29 | 11 | 18 | 39 |
| 3 | FCK (M) | 17 | 9 - 5 - 3 | 25 | 14 | 11 | 32 |
| 4 | OB | 17 | 9 - 4 - 4 | 35 | 23 | 12 | 31 |
| 5 | AaB | 17 | 7 - 5 - 5 | 24 | 21 | 3 | 26 |
| 6 | FCM | 17 | 7 - 2 - 8 | 29 | 25 | 4 | 23 |
| 7 | AGF | 17 | 7 - 1 - 9 | 26 | 36 | -10 | 22 |
| 8 | Viborg | 17 | 5 - 5 - 7 | 30 | 27 | 3 | 20 |
| 9 | Herfølge | 17 | 4 - 5 - 8 | 17 | 23 | -6 | 17 |
| 10 | FC Nordsj. | 17 | 3 - 6 - 8 | 21 | 33 | -12 | 15 |
| 11 | Frem | 17 | 4 - 2 -11 | 17 | 32 | -15 | 14 |
| 12 | AB | 17 | 2 - 1 -14 | 11 | 37 | -26 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

**Danska 1. deild**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AC Horsens | 15 | 13 - 1 - 1 | 31 | 9 | 22 | 40 |
| 2 | Randers FC | 15 | 10 - 2 - 3 | 40 | 23 | 17 | 32 |
| 3 | Silkeborg | 15 | 9 - 4 - 2 | 33 | 13 | 20 | 31 |
| 4 | Køge | 15 | 8 - 4 - 3 | 27 | 20 | 7 | 28 |
| 5 | HFK Sønderj. | 15 | 8 - 3 - 4 | 40 | 21 | 19 | 27 |
| 6 | FC Nordjylland | 15 | 7 - 3 - 5 | 17 | 17 | 0 | 24 |
| 7 | Skjold | 15 | 7 - 2 - 6 | 34 | 29 | 5 | 23 |
| 8 | Fredericia | 15 | 7 - 2 - 6 | 23 | 24 | -1 | 23 |
| 9 | Ølstykke | 15 | 7 - 1 - 7 | 34 | 30 | 4 | 22 |
| 10 | Nykøbing | 15 | 5 - 3 - 7 | 24 | 27 | -3 | 18 |
| 11 | B 93 | 15 | 4 - 4 - 7 | 24 | 27 | -3 | 16 |
| 12 | Vejle | 15 | 4 - 3 - 8 | 23 | 32 | -9 | 15 |
| 13 | Fremad Amager | 15 | 3 - 5 - 7 | 21 | 28 | -7 | 14 |
| 14 | FC Aarhus | 15 | 3 - 1 -11 | 15 | 39 | -24 | 10 |
| 15 | Brønshøj | 15 | 2 - 2 -11 | 17 | 42 | -25 | 8 |
| 16 | B 1913 | 15 | 1 - 4 -10 | 12 | 34 | -22 | 7 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Jann Ingi Petersen (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Næstved | 15 | 10 - 2 - 3 | 35 | 14 | 21 | 32 |
| 2 | Dalum | 15 | 9 - 3 - 3 | 39 | 22 | 17 | 30 |
| 3 | HIK | 15 | 7 - 4 - 4 | 28 | 24 | 4 | 25 |
| 4 | Holbæk | 15 | 7 - 4 - 4 | 25 | 22 | 3 | 25 |
| 5 | Jetsmark | 15 | 6 - 5 - 4 | 27 | 23 | 4 | 23 |
| 6 | Brabrand | 15 | 6 - 4 - 5 | 29 | 21 | 8 | 22 |
| 7 | B1909 | 15 | 6 - 3 - 6 | 31 | 26 | 5 | 21 |
| 8 | Slagelse | 15 | 6 - 3 - 6 | 26 | 23 | 3 | 21 |
| 9 | Kolding FC | 15 | 6 - 3 - 6 | 24 | 23 | 1 | 21 |
| 10 | Kalundborg | 15 | 5 - 4 - 6 | 33 | 36 | -3 | 19 |
| 11 | Lyngby | 15 | 4 - 6 - 5 | 24 | 26 | -2 | 18 |
| 12 | Holstebro | 15 | 5 - 3 - 7 | 27 | 31 | -4 | 18 |
| 13 | Glostrup | 15 | 5 - 2 - 8 | 24 | 32 | -8 | 17 |
| 14 | Skive | 15 | 4 - 3 - 8 | 29 | 35 | -6 | 15 |
| 15 | Hjørring | 15 | 4 - 2 - 9 | 19 | 45 | -26 | 14 |
| 16 | Hvidovre | 15 | 3 - 3 - 9 | 18 | 35 | -17 | 12 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Lyngby)

**Skotska Premier League**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Celtic | 12 | 11 - 1 - 0 | 38 | 3 | 35 | 34 |
| 2 | Rangers | 12 | 9 - 2 - 1 | 33 | 11 | 22 | 29 |
| 3 | Hearts | 12 | 7 - 2 - 3 | 19 | 15 | 4 | 23 |
| 4 | Motherwell | 11 | 5 - 3 - 3 | 14 | 12 | 2 | 18 |
| 5 | Dundee | 12 | 4 - 4 - 4 | 14 | 13 | 1 | 16 |
| 6 | Livingston | 12 | 4 - 4 - 4 | 13 | 13 | 0 | 16 |
| 7 | Hibernian | 12 | 4 - 4 - 4 | 14 | 17 | -3 | 16 |
| 8 | Dunfermline | 11 | 4 - 3 - 4 | 10 | 15 | -5 | 15 |
| 9 | Kilmarnock | 12 | 3 - 2 - 7 | 14 | 28 | -14 | 11 |
| 10 | Dundee Utd. | 12 | 2 - 4 - 6 | 9 | 21 | -12 | 10 |
| 11 | Aberdeen | 12 | 2 - 1 - 9 | 9 | 24 | -15 | 7 |
| 12 | Partick | 12 | 0 - 2 -10 | 9 | 24 | -15 | 2 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)